**Beinir Johannesen**
**Jenis av Rana**
**Helgi Abrahamsen**
**Bárður á Steig Nielsen**
**Steffan Klein Poulsen**
**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**løgtingsfólk**

**Broytingaruppskot IV**

**til**

**3. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 90/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin)** (Framleiðsla og søla av el og fjarhita)

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. § 1, nr. 6 verður orðað soleiðis:

   "§ 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   "Framleiðsla av el frá framleiðsluverkum omanfyri 11 kW er einans loyvd við loyvi frá landsstýrisfólkinum. SEV ásetur standardtreytir fyri íbinding í elnetið av framleiðsluverkum upp til og við 11 kW. Íbindingartreytirnar skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum."

Viðmerkingar:
Sambært galdandi lóg kunnu framleiðsluloyvi verða latin í upp til 20 ár, og síðani kunnu loyvini verða longd við í mesta lagi 20 árum í senn.

Í lógaruppskotinum frá landsstýriskvinnuni verður hetta broytt til, at loyvini kunnu bara leingjast einaferð við 20 árum, tó kunnu loyvi til skipanarberandi eindir hjá SEV verða longd fleiri ferðir.

Uppskotssetararnir duga ikki at síggja, hvat endamálið skal vera við hesi broytingini. Verandi skipan setir ikki myndugleikan á økinum ella menning av elframleiðsluøkinum til viks á nakran hátt, og tí verður skotið upp at halda fast við hesa skipanina.

Viðmerkingar til broytingina:
Avleiðingin av umorðingini av § 1, nr. 6 í uppskotinum er, at § 4, stk. 2 í galdandi lóg verður varðveitt óbroytt. Tann ásetingin er soljóðandi: *"Loyvi verður latið fyri tíðarskeið, ikki longri enn 20 ár, og kann verða longt við í mesta lagi 20 árum í senn."*

**Á Løgtingi, 23. mai 2023**

| | |
|---|---|
| Beinir Johannesen | Jenis av Rana |
| Helgi Abrahamsen | Bárður á Steig Nielsen |
| Steffan Klein Poulsen | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur |